ítróttur

Nr. 226 • hósdagur • 22. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

130 milliónir fyri Zuma

Tað tykist nú sannlíkt, at suðurafrikanska stjørnan í FCK fer at gerast dýrasti leikarin, sum nakran tíð er seldur úr einum donskum felag

Fleiri ensk feløg sigast vera til reiðar at leggja 130 mió.kr. á borðið fyri at keypa Sibusiso Zuma frá FCK

DANMARK
Jákup Mørk

Tíðliga í heyst ljóðaði, at enska stórfelagið, Arsenal, skuldi vera til reiðar at leggja umleið 60 mió.kr. á borðið fyri suðurafrikanska álopsmannin hjá FCK, Sibusiso Zuma.

Hetta varð tó av ongum, men tað merkir ikki tað sama sum, at einki hald var í tíðindunum. Tvørtur ímóti hevur venjarin hjá Arsenal, Arsene Wenger, váttað, at hann hevur áhuga í Zuma, men orsakað av trupulleikum við arbeiðsloyvinum bar ikki til at keypa álopsmannin.

Virðið hækkar

Støðan í Onglandi er nevnliga tann, at skulu leikarar úr londum uttan fyri ES fáa sáttmála, krevst at teir lúka ávís krøv, og eitt av hesum er, at leikarin skal hava leikt ein ávísan part av seinastu landsdystunum hjá tjóð sínari.

Hesa treyt kundi Zuma ikki uppfylla í heyst, men umboðsmaður hansara boðar nú frá, at verður Zuma á liðnum hjá Suðurafrika, tá Africans Nations Cup verður leikt í januar/-febrar, so lýkur hann bretsku krøvunum.

Hetta hevur aftur økt um áhugan fyri Zuma, og tað eru ikki smávegis upphæddir, sum tað nú verður tosað um.

Eitt nú sigast Arsenal, Sunderland og Leeds vera til reiðar at leggja heilar 130 mió.kr. á borðið, so líkt er nú til, at Todi Jónsson í vár verður ein álopsfelaga fátækari, meðan FCK fær 130 mió.kr. meira í rokaða pengakassan.

Flyting

Á heimasíðuni hevur Flogbóltssambandið boðað frá nøkrum broytingum í kappingarskipanini í vetur.

Ein av hesum er, at dysturin millum TB og Mjølnir í meistaradeildini hjá kvinnum verður fluttur frá sunnudegnum, 25. november til sunnudagin 9. desember kl. 15.00.

Eisini eru nakrar flytingar í øðrum deildum, og kunnu hesar síggjast á heimasíðuni. Slóðin á hesari er www.fbf.fo.

-jm

Sigur til OB

Ein dystur í dansku superliguni varð leiktur mánakvøldið, tá OB á heimavølli tók ímóti FC Midtjylland.

Johan Byrial Hansan var heldur ikki hesa ferð at síggja á liðnum hjá OB, sum tryggjaði sær ein 2-1 sigur, og harvið togaði seg upp á eitt sætta pláss í deildini.

Tað sá annars svart út hjá odensianarunum, tá Mwape Miti fekk reyða kortið, meðan støðan var 1-1, men tað eydnaðist tó Lars Jacobsen at tryggja heimaliðnum sigurin kortini.

-jm

FCK aftur í eldin

Hóskvøldið skal felagið hjá Toda til eitt slag av sveinaroynd, tá týska stórfelagið, Borussia Dortmund, kemur á vitjan í Parkini

UEFA-CUP
Jákup Mørk

Hóast Todi Jónsson framvegis er uttan fyri við skaða, so munnu nógv føroysk fótbóltseygu fara at fylgja væl við, tá týska stórfelagið, Borussia Dortmund, kemur á vitjan hjá FCK í dag.

Talan er um triðja umfar í UEFA-Cup kappingini, og hóast talan er um sterka mótstøðu, so er tað ikki heilt frítt, at spenningurin í danska høvuðsstaðnum er stórur. Ikki minst orsakað av, at fleiri av bestu úrslitunum hjá donskum liðum í europeiskum høpi eru komin móti júst týskum mótstøðuliðum. Stóru sigarnir hjá Brøndby og B1909 móti ávíkavist Eintracht Frankfurt og Bayern München standa enn feskir í minninum, og nú er so upp til FCK at prógva, um teir kunnu endurtaka okkurt av hesum.

Skerdir týskarar

Umframt Toda Jónsson so noyðist FCK eisini at vera Pascal Simpson og Michael Mio Nielsen fyriuttan, men annars eru allir mans tøkir.

Í Dortmund er støðan nakað væl øðrvísi, og venjarin hjá felagnum, Matthias Sammer, er noyddur at verða fleiri av føstu stuðlunum fyriuttan. Millum annað eru landsliðsleikararnir, Stefan Reuter, Jörg Heinrich, skaddir, umframt at verjuleikarin, Christian Wörns, eisini er úti. Heldur ikki dýrasti leikarin í bundesliguni, kekkiski Tomás Rosicky, er tøkur.

Alt hetta ger, at FCK so avgjørt ikki eru uttan møguleikar, og venjarin hjá Toda og teimum, Hans Backe, tykist eisini hava góðar vónir. Ikki minst eftir stórspælið hjá liðnum um vikuskiftið, tá teir »bert« vunnu l-1 á Viborg.

Dysturin byrjar klokkan 17.15, og verður sent beinleiðis á dansku 3+ frá kl. 17.00.

Samstundis sum FCK roynir seg á heimavølli, skal hitt stóra danska liðið, Brøndby, royna seg á útivølli móti italska Parma.

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3271
Navn: Sp/f J.H. Heilsøla
Adressa: Mannaskarð 4, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 16.11.2001
Viðtøkudato: 16.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Jan Gaard Joensen, Vallalíð 1, 100 Tórshavn og Hans Fróði Hansen, Dánjalstrød 15, 100 Tórshavn.
Stjórn: Jan Gaard Joensen, Vallalíð 1, 100 Tórshavn og Hans Fróði Hansen, Dánjalstrød 15, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjórunum hvør sær ella í felag.
Grannskoðari: Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 16.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, herundir heilsøluvirksemi og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 853, P/F Gjáarsmolt, 476 Gjógv.

Viðtøkur broyttar: 10.09.2001.
Nevnd:
Innkomin í nevndina: Kornelius Johannesen, 476 Gjógv og Jón Purkhús, Undir Hálsi 10, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum, ella av 3 nevndarlimum í felag, ella av allari nevndini í felag.

Skráseting Føroya tann 20. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 136, P/F Vónin, 530 Fuglafjørður.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Joen Jakob Olaf á Lakjuni, 530 Fuglafjørður.
Innkomin í nevndina: Jón Rasmussen Hamarsniðið 14, 700 Klaksvík og Maria á Lakjuni, Brúgv 7, 530 Fuglafjørður.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Joen Jakob Olaf á Lakjuni, 530 Fuglafjørður.
Innkomin sum stjóri: Hjalmar Petersen, Stóra Gerði 13, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 20. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3270
Navn: Sp/f Faroe Leasing Company Ltd.
Adressa: 950 Porkeri
Kommuna: Porkeris Kommuna
Stovningardato: 16.11.2001
Viðtøkudato: 16.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F Klettur, 950 Porkeri
Stjórn: Johannes Joensen, 900 Vági
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: P/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, statsaut. revisorar, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 16.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og leiga út fiskifør, og annað virksemi, sum hevur samband við hesa vinnu.

Skráseting Føroya tann 20. november 2001

Kristin Balle

Heimarøktin Norðstreymoy
Heilsuhjápari

Søkt verður eftir fólki at arbeiða sum avloysari í nátt-arvakt á Eldrasambýlinum í Vestmanna at byrja skjótast tilber.

Ynskiligt er at viðkomandi hevur útbúgving sum heilsuhjálpari ella hevur kunnleika og royndir innan eldrarøkt.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Heilsuhjáparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til økisleiðaran á tlf. 333249.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

Heimarøktin øki 2
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

Umsóknarfreist 06.12.2001

Sølufólk

Søkt verður eftir sølufólki til heilsøluvirkið okkara at byrja skjótast gjørligt.

Útbúgvingin er ikki alt avgerðandi, men roknað verður við, at tú hevur royndir innan handil og sølu.

Tú skal duga at samarbeiða, vera sjálvstøðugur, opin og álítiandi. Hava áræði at bjóða av, vera áhugaður og málsøkin.

Arbeiðsøkið umfatar allar Føroyar.

Løn og aðrar arbeiðstreytir sambært avtalu.

Áhugaði kunnu senda inn skrivliga umsókn til P/F Poul Michelsen ella venda sær til Claus Mørkøre sølustjóra á tlf. 314650.

P/F Poul Michelsen

Heimarøktin Norðstreymoy
Heimahjálpari

Søkt verður eftir fólki at arbeiða sum heimahjálpari í Hósvík 25 tímar um vikuna í skiftandi vaktum at byrja 01. desember 2001 ella eftir nærri avtalu.

Ynskiligt er at viðkomandi hevur útbúgving sum heilsuhjálpari ella hevur kunnleika og royndir innan eldrarøkt.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Heilsuhjáparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til økisleiðaran á tlf. 333249.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

Heimarøktin øki 2
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

Umsóknarfreist 06.12.2001

Vinnuøki til sølu!

Eitt grundøki til støddar 1305 m² til vinnuendamál í Akranesgøtu, Tórshavn, verður við hesum lýst til sølu, um nóg høgt boð fæst.

Áhugað kunnu venda sær til

Advokatfelagið við Strond 4

Hús til leigu

Dupulthús til leigu við Villingardalsvegin við sera góðum útsýni.

1. hædd: gongd, bryggers, stórt baðirúm við bað og brúsu og stórum klædnarúmi og tvey verilsir.
2. hædd: wc, sovikamar, køkur, stova, gongd og altan + ovasta loft. Eisini er møguleiki at leiga stóra garasju, ið hoyrir til húsini.

Helst leigusáttmáli í min. 2 ár, til fólk, ið fara væl um ella fyritøku. Prísuppskot 8.000,00 + ljós og hita.

Bill. mrk. 3388

KIA CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

SJÓ–FRAKT
SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tel. 32 22 22